## DAGSINS MEINING

# Goyma seg gloymdar

Seinastu vikuna er ymiskt farið fram á politiska pallinum, sum vert er at merkja sær. Løgtingið er farið í summarfrí, rættuligir brotasjógvar hava gingið um varaløgmann, ein veljarakanning er almannakunngjørd, og kvinnur úr trimum føroyskum flokkum hava verið á ráðstevnu í Grønlandi.

Tað er uttan iva rætt, tá Løgtingsskrivstovan ger av, at hon bert rindar ferðaútreiðslur til fólk, sum eru vald á Føroya Løgting í slíkum føri, sum hesum. Tískil vóru tað bara Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, sum fingu umboð á ráðstevnuna, sum einastu flokkar, ið hava kvinnur valdar. Fólkaflokkurin var kortini so mikið at sær komin, at »teir« rindaðu sjálvir fyri sítt umboð, meðan Javnaðarflokkurin ikki vildi brúka pengar til hetta – ella onga kvinnu hevði at senda avstað?

Javnaðarflokkurin eigur løgmann. Tí er tað eisini ábyrgd Javnaðarfloksins, at eingin kvinna er í landsstýrinum. Tað er løgmaður, sum setir landsstýrisfólk, tí er ábyrgdin hansara. Javnaðarflokkurin eigur eisini landsstýrismannin í javnstøðumálum, og tí hevði tað sømt seg flokkinum at virt arbeiðið at fáa kvinnur virknar í politikki, men her lekur millum teori og praksis.

Veljarakanningin, sum Sosialurin kunngjørdi hósdagin, man hava verið herskin biti hjá Javnaðarflokkinum eisini. Løgmaður sigur, at tað er tungt at bera lessið, meðan John Johannessen sigur, at teir hava svikið vallyftini. Helst hava báðir rætt. Men tað er mangan ilt at fáa greiðu á, hvat Javnaðarflokkurin heldur um dagsins politikk. Um tú ikki situr heima framman fyri skíggjan og lurtar, so fært tú einki at vita, tí tingmenn Javnaðarfloksins luttaka ikki í almenna orðaskiftinum. Tað eru vikur ímillum, at tú sært onkran teirra skriva í bløðunum. Her kundu tingmenn Javnaðarfloksins lært av eitt nú sambands- og tjóðveldisfólki, sum altíð og støðugt eru virkin í almenna kjakinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Samhaldsfasti gevur stóra hækking í pensjónunum



**HANS PAULI STRØM**
Landsstýrismaður

| Pensjónsupphæddir mánaðarliga | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | Hækking í kr. | í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Grundarupphædd - stakur pensjónistur | 4.169 | 4.169 | 4.169 | 4.169 | 0 | 0 % |
| Pensjónsviðbót - stakur pensjónistur | 2.544 | 2.646 | 2.752 | 2.862 | 318 | 13 % |
| Grundarupphædd - giftir pensjónistar | 3.313 | 3.313 | 3.313 | 3.313 | 0 | 0 % |
| Pensjónsviðbót - giftir pensjónistar | 1.969 | 2.048 | 2.130 | 2.215 | 246 | 12 % |
| Samhaldsfasti | 697 | 910 | 1200 | 2000 | 1303 | 187 % |
| **Stakur, Grundupph. + Viðbót + Samhaldsfasti** | **7.410** | **7.725** | **8.121** | **9.031** | **1.621** | **22 %** |
| **Gift, bæði, Grundupph. + Viðbót + Samhaldsfasti** | **11.958** | **12.542** | **13.286** | **15.056** | **3.098** | **26 %** |

*Upphæddin fyri samhaldsfasta fyri 1.1. 2007 er mett eftir upplýsingum frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum*




## - svar til opið bræv frá Hjalmar Joensen

Í Dimmu frá 31. mai skrivar Hjalmar Joensen, at meðan allir løntakarar í Føroyum fáa lønarhækkan annað ella triðja hvørt ár, so "fáa fólkapensjonistar onki, og kann hetta ikki vera rætt".

Nei, hetta er heldur ikki rætt. Á hvørjum árið hækkar pensjónsviðbótin 4%. Tað svarar til, at á hvørjum ári hækkar mánaðarliga pensjónin við umleið 100 kr.

Men størsta hækkingin í pensjónini síðan henda samgongan kom til, er hækkingin av Samhaldsfasta.

Henda samgongan gjørdi av, at Samhaldsfasti skuldi hækkast bæði 1.jan. 2005, 1. jan. 2006 og aftur 1. jan. 2007.

Og tí hækkaði Samhaldsfasti við 213 kr. mánaðarliga pr. 1. jan. 2005. Og hann hækkaði aftur við 280 kr. mánaðarliga pr. 1. jan. 2006. Men tann størsta hækkingin verður 1. jan. 2007, tá Samhaldsfasti hækkar við uml. 800 kr., so hann kemur upp á umleið 2.000 kr. um mánaðin. Hetta merkir, at síðani 1. jan 2004 fer útgjaldið úr Samhaldsfasta at verða umleið trýfaldað.

Tá vit tosa um pensjón, eiga vit at taka Samhaldsfasta saman við fólkapensjónini. Tí eins og øll, sum fylla 67, eiga rætt til fólkapensjón, eiga eisini øll sum fylla 67, sama rætt til Samhaldsfasta !

Tað eru fleiri lesarabrøv skrivaði seinastu tíðina, har man bara tosar um fólkapensjónina, og púrasta gloymir Samhaldsfasta! Hetta er ikki rætt ! Tá man tosar um pensjónina í Føroyum, eigur man at taka bæði fólkapensjónina og Samhaldsfasta við ! Annars sigur man ikki satt !

Í talvuni við hesum greinastubba er sett upp, hvussu stórur vøksturin hevur verið og fer at verða, tá vit taka hækkingina í Samhaldsfasta 1. jan. 2007 við. Hetta eru upphæddirnar uttan móttrokning av aðrari inntøku og uttan skatt.

Hendan talvan vísir, at frá 1. jan. 2004 til 1. jan 2007 hækkar pensjónin hjá einum støkum við stívliga 1.600 kr. upp í góðar 9.000 kr. um mánaðin. Og fyri eini hjún verður hækkingin stívliga 3.000 kr upp í góðar 15.000 kr. um mánaðin.

So tá ið Hjalmar Petersen heitir á meg um at fara til verka at bøta um pensjónirnar, so at tær kunnu hækka tað sama, sum lønirnar hækka, so eru vit longu væl í gongd. Frá 1. jan. 2004 til 1. jan. 2007 verður vøksturin í pensjónini hjá støkum 22% og hjá giftum 26%. Hetta er rættiliga stóru vøkstur í 3 ár, og tað er fleiri ferðir meir enn lønarvøksturin í sama tíðarskeiði.

Tó viðurkenna vit eisini í landsstýrinum og samgonguni, at pensjonistarnir eiga at fáa okkurt slag av serligum ískoyti til pensjónina fyri tann hækkandi livikostnaðin av tí ógvisliga vøkstrinum í oljuútreiðslunum. Hetta er ein útreiðsla, sum serliga rakar pensjonistarnar hart, og tað taka vit upp í fullum álvara í samband við okkara arbeiði við fíggjarlógarætlanini fyri komandi ár.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.